## Bøndur stóran stuðul

Ongastaðni í heiminum fáa bøndur so stóran stuðul frá tí almenna sum í Íslandi. Tað sigur OECD, sum hevur roknað seg fram til, at íslendski landbúnaðurin fekk 15 mia. íslendskar krónur í almennum stuðuli í fjør. Tað mesta verður latið bøndrum, sum hava seyð ella neyt, men lutfalsliga eru tað høsnagarðarnir, sum fáa mest. 66 prosent av inntøkuni hjá einum íslendskum bónda er almennur stuðul. Í Noregi er talið 65 prosent og í ES 32 prosent.



## Kópalýsi kann lekja

Nýggjar kanningar, sum NAMMCO hevur staðið fyri, vísa, at kópalýsi kann brúkast til heilivág. Granskararnir siga, at í kópalýsi er so mikið av omega 3-feittsýru, at lýsið kann brúkast til at viðgera sjúkur í tarmunum hjá fólki. Kanningarúrslitið varð lagt fram á einari altjóða kóparáðstevnu í Vasa í Finnlandi í síðstu viku, og har var semja um, at Norðurlond eiga at halda fram við kanningunum, sigur. Norðurlendska Ráðharraráðið.

# llisheiminum í Runavík





*Marin á Skipanesi fekk bløðruna*



*Jákup slapp ikki undan at "fylla sperilin"*



*Heidi handar Jákupi eina lítla gávu*



*Asfinn Sigvardsen hyggur eftir vektini - um 26 pund*